# Ragnhild fekk herðaklappið frá Javna

**- Tú fært herðaklappið fyri tað, tú ert og hevur verið fyri tey menningartarnaðu ígjøgnum eitt heilt lívsskeið, segði formaðurin í Javna, tá hon fríggjadagin handaði Ragnhild Dahl Herðaklappi frá Javna 2004**

HERÐAKLAPPIÐ FRÁ JAVNA.
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*- Ragnhild dugir, sum fáur, at seta seg inn í støðuna hjá teimum menningartarnaðu. Hon talar teirra søk og virðir tey, sum menniskju, segði Malena Arnholdsdóttir millum annað, tá hon handaði Ragnhild Dahl Herðaklappið 2004 frá Javna.*

Eini 70 fólk mundu vera savnað, tá Javni lat Herðaklappið 2004 á samkomu fríggjadagin. Ein samd starvsnevnd hevði gjørt av, at Herðaklappið hesuferð skuldi fara til Ragnhild Dahl, sum alt sítt lív hevur arbeitt við at bøta um korini hjá teimum menningartarnaðu í Føroyum.

## Eitt stás!

Malena Arnholdsdóttir fjaldi ikki yvir, at tað var henni ein sonn gleði at handa Herðaklappið 2004 til Ragnhild Dahl.

- Ragnhild og eg eru bygdabørn – báðar úr Fuglafirði og gingu í sama flokki í Realskúlanum, so eg kenni hana rættuliga væl. Ragnhild hjá Bakka-Pól er í dag Ragnhild Dahl – men sama ger, hvat hon kallast, hon hevur altíð verið og er eitt stás!, segði Malena og legði afturat, at Ragnhild fekk herðaklappið ikki bara fyri tað, hon hevur gjørt fyri tey menningartarnaðu í 2004, men fyri alt sítt lívsstarv sum ótroyttiliga røddin hjá teimum, sum ofta standa veikast.

Javni varð stovnað í mai 1971, og longu í apríl árið eftir fór Ragnhild til Danmarkar at læra til umsorgarassistent, sum útbúgvingin tá kallaðist, greiddi Malena frá og hugleiddi eitt sindur um hetta gamla útbúgvingarheitið

- Umsorgarassistent - eitt langt orð, men tó, hvat er umsorgan veruliga? Eg havi lisið mær eitt sindur um hugtakið, men Ragnhild, hon lærdi og dugir tað. Tað er grundleggjandi at leggja lag í onnur fólk. At geva sær far um, hvussu onnur fólk hava tað. At tosa ella hava samskifti við tey, har tey eru.

## Altíð tíð at lurta

Ragnhild valdi at fara til Rødbygaard at læra, tí júst har vóru teir flestu av hennara landsmonnum, ið vóru menningartarnað. Malena vísti á, at hetta at Ragnhild ynskir at vera nær hjá teimum, ið hava menningartarn, hava tey og avvarðandi teirra kent og verið glað fyri øll árini – og eru tað enn í dag.

31. mars í 1975 var útbúgvingin liðug og 1. apríl byrjaði Ragnhild at arbeiða á deild 5. Í 1980, tá ið Eirargarðar læt upp, byrjaði hon sum deildarleiðari á Eirargarði 16 A. Í 1988 byrjaði hon sum heimavegleiðari á Andveikraverndini.

- Vit, ella eg,- sum "nýggj" eru í Javna, - hava hoyrt um, hvussu gott tað var at vitja á Andveikraverndini. Eisini hvussu tey við menningartarni fóru at vitja hana. Hon gav sær tíð at lurta og skilti tey - kanska betri enn foreldrini viðhvørt. Um tey ynsktu tað, fór hon ein túr í býin at fáa sær ein drekkamunn við teimum eftir arbeiðstíð. Kanska serliga starvið sum heimavegleiðari, hevur verið tað, vit foreldur í dag elska Ragnhild mest fyri - og her møtti eg Ragnhild aftur, tí eisini hjá mær hevur hon verið á heimavitjan, og tað var mær ein góð vitjan, segði Malena

## Takk fyri tað tú ert

Malena greiddi frá, at Ragnhild var við til at skipa fyri teimum tá so kendu summarlegunum bæði í Føroyum og uttanlands. Eisini tá Javni hevur skipað fyri skeiðum, fundum og øðrum tiltøkum hevur Ragnhild altíð verið til dystin fús. Í 1994, tá ið Andveikraverndin varð løgd saman við Almannastovuni, flutti hon eisini við og er har enn. Ragnhild er eisini formaður í frítíðarkubbanum og hevur verið tað síðani hann byrjaði, so hon hevur støðugt fingurin á pulsinum hjá sínum kæru – teimum í hava menningartarn, segði Malena og legði at enda afturat

- Ragnhild dugir, sum fáur at seta seg inn í støðuna hjá teimum menningartarnaðu, hon talar teirra sak og virðir tey fyri tað, tey eru, og stuðlar teimum, ið tí tey ynskja. Aðalendamálið hjá Javna er at stuðla fólki við menningartarni og teimum, sum av teimum varða og fremja áhugamál teirra.

Vit í felagnum royna at arbeiða eftir hesari meginreglu. Men hetta er júst tað, ið tú Ragnhild hevur gjørt og ger hvønn tann einasta dag. Tað er tað, ið vit ynskja at geva tær Herðaklappið 2004 fyri.

Takk Ragnhild fyri tað, tú ert og tað, tú gert – vit vóna at tú heldur á í nógv ár afturat, segði Malena Arnholdsdóttir, og bað Ragnhild koma at taka ímóti Herðaklappinum frá Javna 2004.

## Hans Arni Bertholdsen formaður í ferðslunevndini

Vanliga er formaðurin í teknisku nevnd býráðsins eisini formaður í ferðslunevndini, men á býráðsfundi í Klaksvík mánakvøldið varð Hans Arne Bertholdsen býráðslimur og limur í teknisku nevnd valdur sum býráðsins umboð í ferðslunevndini. Nevndin hevur skipað seg við Hans Arna sum formanni.

Ferðslunevndin er nú soleiðis mannað fyri valskeiðið 2005-2008:

1) Hans Arne Bertholdsen býráðslimur, formaður (umboð fyri býráðið)
2) Hans L. Djurhuus sýslumaður (umboð fyri løgregluna)
3) Gunnleyg K. Dánjalsson tekniskur hjálpari (umboð fyri teknisku umsiting)

Hans L. Djurhuus og Gunnleyg K. Dánjalsson, ið eisini er skrivari hjá ferðslunevndini, sótu frammanundan í nevndini, meðan Hans Arne Bertholdsen er nývaldur.

Hans Arni Bertholdsen - sum eisini er nývaldur í býráðnum, har hann umboðar Sambandsflokkin - er føddur og uppvaksin í Klaksvík. Hans Arni var útbúgvin maskinsmiðjur í 1987, og hann tók víðkað maskinmeistaraprógv í 1990. Hann hevur í 15 ár starvast hjá A. P. Møller til fyri einum ári síðan, tá hann fór í starv hjá JFK Seafood sum maskininspektørur.

## Domus-vegurin útboðin

Vegurin til nýggju íbúðirnar vestanfyri Helnabrekku í Klaksvík verður í hesum døgum útboðin í almennari lisitatión. Talan er um ein 320 m langan veg, sum fer oman av Helnabrekkuvegnum nakað norðan fyri húsini hjá Anskari Hansen. Arbeiðið umfatar í stórum: jørð, kloakk-, betong-, vatn- og asfalt arbeiði.

Lisitatiónin verður 7. mars 2005 kl. 15 á Teknisku Umsiting. Tað er Sámal Johannesen, ráðgevandi verkfrøðingur, sum hevur gjørt útbjóðingartilfarið í samráð við Teknisku Umsiting.

Tær fyrstu íbúðirnar hjá Domus verða ætlandi klárar at avhenda í august/septembur 2005.

**-ave-**

## Staðbundnu nevndirnar fullmannaðar

Á býráðsfundi í Klaksvík mánakvøldið varð samtykt, at Kristian Eli Zachariasen býráðslimur verður umboðið hjá minnilutanum í býráðnum í staðbundnu nevndunum, har Steinbjørn O. Jacobsen borgarstjóri er formaður. Nevndirnar kunnu sostatt nú fara til verka.

Limirnir í staðbundnu nevndunum fyri valskeiðið 2005-2008 eru hesir:

Árnafjarðarnevndin:
Steinbjørn O. Jacobsen borgarstjóri (formaður)
Kristian Eli Zachariasen býráðslimur
Tormóður M. Árnatón
Niclas F. Justinussen
Jóna S. Joensen
1 eykalimur: Teodor A. Olsen
2 eykalimur: Olivar J. Olsen

Mikladalsnevndin:
Steinbjørn O. Jacobsen borgarstjóri (formaður)
Kristian Eli Zachariasen býráðslimur
Danial Eliasen
Jógvan A. Sørensen
Christian Andreasen

Trøllanesnevndin:
Steinbjørn O. Jacobsen borgarstjóri (formaður)
Kristian Eli Zachariasen býráðslimur
Eyðun Eliassen
Mikkjal Joensen
Maud Østerø

Ragnhild Dahl:

# Tit eru mínar perlur

**- Takk øll somul fyri allar tær góðu løturnar, ég eftirhondini havi samlað mær sum smáar, dýrabærar perlur, segði ein rørd Ragnhild Dahl millum annað, tá hon tók ímóti Herðaklappinum frá Javna**

HERÐAKLAPPIÐ FRÁ JAVNA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Ragnhild Dahl var bæði ovfarin og rørd, tá hon tók ímóti Herðaklappinum frá Javna. Hon hevði ongantíð droymt um, at hon skuldi verða heiðrað á henda hátt, og visti heldur ikki, um hon hevði uppiborið heiðurin. Sjálv helt Ragnhild, at tað mundu vera mong, ið heldur enn hon høvdu uppiborið eitt slíkt herðaklapp. Men tað var ongin ivi um, at Ragnhild var sera glað og takksom, tá hon nýtti høvið at takka fyri herða-klappið.

## Dýrabærar perlur

Í takkarrøðuni nevndi Ragnhild fyrst av øllum, øll tey fittu menniskju, hon hevði lært at kenna ígjøgnum hesi meir enn 30 árini, og tað var neyvan eitt eyga turt, tá Ragnhild setti orð á sínar kenslur.

- Takk fyri, at tit hava givið mær loyvi at fylgja við í tykkara lívi, og takk fyri alt, tit hava lært meg og givið mær av góðum løtum, upplivilsum og góðum minnum, sum eg havi samlað mær sum smáar dýrabærar perlur. Eftirhondini havi eg eina langa perlurekkju. Hesar perlur taki eg mangan fram og minni meg aftur á við gleði og takksemi.

Eg vóni, at eg á onkran hátt havi lønt tykkum tað aftur og havi givið tykkum kanska eina lítla perlu í part, ella flutt onkur mørk ella forðingar á tykkara lívsleið, sum tit kunnu minnast aftur á við gleði. Vónandi koma vit at eisini framyvir at hava nógvar góðar løtur saman.

Stóra tøkk fyri.